Fylgiskjal 6

Viðmerkingar til broytingar um løgtingslóg um tilbúgving 5.jan2020

Vaktsentralurin á LS

- Heilsuverkið hevur bert ein vaktsentral, og er hann staðsettur á Landssjúkrahúsinum. Her starvast 7 vaktleiðarar, har tveir eru til til arb. frá 08-16 yrkadagar

Vakttelefonirnar á KS og SS

- Á Suðuroyar Sjúkrahús og Klaksvíkar Sjúkrahús er eingin vaktsentralur, har er tað soleiðis, at tað eru tær ymisku deildirnar, ið taka imóti boðum ,tá tørvur er á sjúkrabili. Hetta er eftir mínum tykki ikki nøktandi, tá tað ið hesum føri kann vera eitt tilfeldigt heilsu starvsfólk, ið skal taka imóti einum bráðneyðugum boðum, og hoyrir hetta ikki nútíðin til. Vanlig heilsufólk hava ikki eina slíka upplæringi til at taka ímóti bráðneyðugum uppgávum, og so eisini at ringja út til avvarandi so sum at spyrja inn til og siga, hvussu tey skulu fyrihalda sær og vegleiða til sjúkrabilurin kemur. Hetta krevur neyva upplæring í samband við tað præhospitala.

Ein felags vaktsentral fyri allar FO

- Ein felags vaktsentralur fyri tær 3 átakseindirnar fyri alt Føroyar, tað verið seg Alarmsentralurin/vaktsentralurin -Heilsuverkið og Sløkkiliðið, og best um hesi húsast undir somu lon.Hetta hevði verið eftir mínum tykki besta loysin, tá allar 3 samstarvseindir kunnu samskifta á sama stað og eisini best fyri borgaran, tá vit høvdu fingið eina munandi stytri responstíð
-

Samsskiftisútgerð

- Somu felags samskiftist útgerð fyri alt Føroya land, soleiðis, at vit altíð kunnu tosa saman, um tørvur er at tosa til Svínoyar ella Mykinesar. Her hugsi eg um ta útgerð, ið Løgreglan fyri kortum hevur tikið í nýtslu.
- Annars er bert ein Alarmsentralur í Fo og er hann staðsettur í í Havn. Klaksvík, Vágar og Suðuroy eru at kalla vaktstøðir.

Vinaliga

Jákup Nolsøe, leiðari

Sjúkraflutningstænastan

Landssjúkrahúsið